## Íslendingar nýtt skip

Eins og føroyingar leggja íslendingar seg eftir at fáa sær størri skip til at fiska uppisjóvarfisk. Tað seinasta skipið, sum íslendingar hava útvegað sær, kom í Vestmannaoyggjarnar um vikuskiftið. Tað er norska skipið Delta, sum eitt felag í Vestmannaoyggjunum hevur keypt, og sum hevur fingið navnið Álsey. Skipið, sum er góðar 66 metrar langt og 12,60 metrar breitt, er bygt í 1987 og tekur umleið 2.000 tons, skrivar Morgunblaðið.



## G! trygdin á netið

Nógv kjak hevur tikið seg upp um trygdina á festivalunum. Dimmalætting hevur skrivað nógv um trygdina á Summarfestivalinum, men nú kemur eisini G!Festivalurin upp í kjakið. Í Dimmalætting hevur verið ført fram, at Summarfestivalurin ikki hevði eina góðkenda skrivliga trygdarætlan, meðan festivalurin hinvegin hevur ført fram, at trygdin var góðkend av løgregluni. Nú hevur G!Festivalurin lagt sína skrivligu trygdarætlan á alnetið. Á heimasíðuni hjá festivalinum ber til at lesa hesa ætlan.

# Flyta Miðbýin í Vágsbotn

**Miðbýurin skal flytast oman í Vágsbotn. Hetta er, sambært kunningarleiðaranum hjá Tórshavnar kommunu, hugsjónin handan arbeiðið, ið kommunan nú er farin undir**

BÝARMENNING
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tórshavnar kommuna er farin undir umfatandi arbeiði í Vágsbotni. Sølubásar við el, rennandi vatni og undir taki skulu gerast til fiskasøluna, soleiðis, at henda lýkur tær treytir, ið heilsumyndugleikarnir krevja fyri tílíka sølu. Tað er arbeiðið við at gera hesar básar, ið kommunan nú er farin undir, sigur kunningarleiðarin hjá Tórshavnar kommunu, Edvardi í Skorðini Joensen. Fyribils er talan um átta básar, sum eftir ætlan skulu standa lidnir um fimm mánaðir. Næsta stig verður, at gera uppaftur fleiri sølubásar, ið verða við liðuna á hesum fyrstu og út ímóti Skinnaraskerði. Triðja byggistigið verður á torginum kring standmyndina av Nólsoyar Páll. Her skulu básar gerast til aðra sølu enn matvøru. Stutt sagt er hugsjónin handan arbeiðið, at Miðbýurin skal flytast oman í Vágsbotn, sigur kunningarleiðarin, ið tó vísir á, at fyribils er bert fyrsta stigið tíðarfest, so enn er ikki greitt, nær miðbýurin endaliga flytur oman í Vágsbotn.

Fyrst á skránni er arbeiðið við at fáa kloakviðurskiftini, ið rættlag, og tí verður kloakkin, nú sambært kunningarleiðaranum fest í kloakkina á Vaglinum, og tað er hetta arbeiðið, ið verður gjørt í hesum døgum.



*Arbeiðið við at gera góðkendar og heilsuliga forsvarligar sølubásar í Vágsbotni er byrjað*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# í blaðnum í morgin

## Sosialurin fer aftur um politisku flokkarnar

Nú stundar móti løgtingsvali, sum í seinasta lagi verður 19. januar, fer Sosialurin undir eina nýggja greinarøð um politisku flokkarnar.

Tað er ein av okkara mætastu samfelagsfrøðingum og politisku viðmerkjarum, Jógvan Mørkøre, sum skrivar greinarøðina ið byggir á samrøður við floksformennirnar fylgt upp við einum søguligum yvirliti yvir einstaka flokkin. Fyrsta greinin var í blaðnum mikudagin, og onnur greinin skuldi koma í blaðnum í dag, men orsakað av forfalli er hon útsett til mikudagin.

Tvær tær fyrstu greinarnar hava verið í og tann triðja kemur í morgin. Hon er um Sambandsflokkin og Kaj Leo Johannesen, formann.

**Sum uppfylging til greinarøðina fer Sosialurin at skipa fyri Trapputingi og orðaskifti í Miðlahúsinum seinnapartin í september**



